## DAGSINS MEINING

# Stýrisskipanarlógin og fullveldi

Tá vit fáa fullveldi verður stýrisskipanarlógin automatiskt burtur, og tí nýtast vit ikki at fylgja henni. Hetta var parolan hjá fullveldismonnum við Høgna Hoydal á odda, tá teir settu fullveldi sum tað einasta á dagsskránna.

Tað er væl skilligt, at teir ynskja hetta at verða so, tí ein og hvør størri broyting krevur, at tvey løgting skulu samtykkja hesa broyting undir stýrisskipanarlógini. Hetta er sjálvsagt eitt sindur óheppið fyri eina samgongu, ið ikki hevur megnað at fingið eina breiða semju í nøkrum máli og ongan meiriluta hevur aftan fyri seg. Nú er argumentið, at tá vit fáa fullveldi, fellir stýrisskipanarlógin burtur frammanundan nakað tunt, men ikki ger tað støðuna betri hjá fortalarunum fyri at loypa stýrisskipanarlógina um, at nú verður einki fullveldi fyribils. Hetta merkir, at óansæð hvat Høgni Hoydal ætlar sær við Grundlóg og øðrum, so má hann gjøgnum tvey løgting.

Tjóðveldisflokkurin tykist ikki góðtaka omanfyristandandi. Hann hevur altíð verið við, at óansæð hvat teir snikka saman, so kann ein fólkaatkvøða rættvísgera tað. Nú er tað soleiðis at fólkaatkvøður í Føroyum ikki eru bindandi, og harafturat er stýrisskipanarlógin samtykt av tveimum løgtingum, og tí skal ein og hvør grundlóg e.l. ígjøgnum tvey løgting, um Tjóðveldismenn vilja tað ella ikki.

Tað ber ikki til, sum fullveldisfortalarar hava hug at gera, at pilka petti burturúr stýrisskipanarlógini og fylgja tí man dámar og loypa tað um, ið man ikki dámar. Ein løgtingssamtykt kemur ongantíð at standa omanfyri Stýrisskipanarlógini.

Tað er í veruleikanum einki minni enn eitt misálit á seg sjálvan, tá samgongan ikki torir at broyta eftir stýrisskipanarlógini, nú tá ið fullveldið er útsett, tí var hon vís í fólksins undirtøku, so var eingin trupulleiki við at varðveita meirilutan eftir næsta val.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ríkisrættarliga støðan hjá Føroyum má greiðast!

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Tað var helst væntandi at fáa ógvuslig aftursvar frá báðum mótpolunum, nú Føroya Javnaðarflokkur á landsfundi sínum í Vestmanna setti málið um ríkisrættarstøðuna aftur um tey nógvu – av samgonguflokkunum forsømdu – málini hjá fólki okkara at loysa í komandi valskeiði.

Tann fundamentalistiska støðan hjá Hoydalsmonnunum er kend og nú eisini roynd. Hendan støðan er óvirðilig og hevur ikki fólkið aftan fyri seg. Føroyingar eru ikki »talibanar«. Føroyingar eru eitt upplýst mentafólk, og varaløgmaður sleppur heldur ikki at »frysta okkum niður«, so hann einsamallur sleppur at hóreiggja sær á hesum økinum gera okkum meira fyri skommum í Danmark.

Hinvegin má ásannast, at umboðar harra Eilif Samuelsen, fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaður, støðuna hjá Sambandsflokkinum, tá hann sigur: »Sambandsflokkurin hevði skverað málið heilt út úr valskránni«, so er tað misskilt harfrá.

Tí ríkisrættarmálið er óloyst enn, og kann tí ikki skverast út. Er allur Sambandsflokkurin framvegis so forstokkaður sum Eilif? Tað trúgvi eg einki uppá, tí flokkurin hevur verið frammi við einum uppskoti til nýggja avtalu við Danmark á hesum ríkisrættarliga økinum?

Og tá sami maður endiliga vil tosa um nítiárini – valupplegg eru annars fyri framtíðina – so hava vit øll – uttan kanska Eilif – ásannað, at júst tann fastlæsta støðan hjá Sambandsflokkinum í 80-unum 90-unum førdi til fullveldiskonfrontatiónina á Kristiansborg, sum Tjóðveldisflokkurin fekk Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin við uppá í 1998. Úrslitið – ella tørvandi úrslitið av hesum politikki og avleiðingarnar – kenna vit í dag. Men Sambandsflokkurin er ikki uttan óbeinleiðis skuld í hesum?

Javnaðarflokkurin vil loysa hetta mál ásannandi, at ein stórur meiriluti av føroyingum ynskir málið loyst á ein virðiligan hátt, og Javnaðarflokkurin hevur givið sítt boð uppá eina loysn, men er hvørki fundamentalistiskur ella einaráðandi á hesum øki, og tað er júst tí, at einki mál – um hetta – tørvar eina breiða undirtøku fyri loysnini bæði á løgtingi og millum Føroya fólk.

Tað nyttar onki at forða fyri eini loysn, tí man ræðist úrslitið. Málið má loysast í komandi valskeiði. Fáa teir flokkar, sum ynskja okkum burtur úr ríkisfelagsskapinum, meiriluta á løgtingi – tað eru samgonguflokkarnir – so fáa vit helst loysing. Men ynskir meirilutin í fólkinum eina loysn, sum liggur innan fyri ríkis- ella ríkjafelagsskapin, so vita tey, hvørjar flokkar tey kunnu atkvøða fyri. Vit hava fólkaræði her á landi.

Javnaðarflokkurin hevur eina støðu, sum vil longur fram á sjálvstýrisleið, men ikki burtur úr ríkisfelagsskapinum, sum gevur okkum ein hóp av fyrimunum.

Men eitt er vist, heldur Sambandsflokkurin fram við at forða øðrum til so mikið sum at royna at loysa ríkisrættarmálið, so fáa vit sum frálíður nógv størri trýst og krav um »loysing her og nú«. Hetta eru kensluliga viðkvom mál, sum ikki øll evna at taka støðu til við heilanum aleina.

Dimmalætting og Sambandsflokkurin kunnu vera heilt trygg um, at Javnaðarflokkurin veit og handlar út frá, at blokkurin bert er ein partur av ríkisfelagsskapinum, sum kanska ikki tørvur verður á í allari framtíð. Líkaleiðis veit Javnaðarflokkurin væl, at samfelagið er ikki statiskt, og vit handla út frá tí. Men vit ivast stórliga viðhvørt, um allir flokkar vita av hesum? Tí ikki ber til í allar ævir at »holde på det bestående«. Jú, vissuliga: tíðir skifta og tørvurin broytist.

P.S. Blokkstuðulin úr Danmark er bert avtalaður fyri árið 2002, so nýggjar samráðingar verða um hetta í 2002 undir øllum umstøðum.

# Eru Føroyar í dag eitt »Lummadiktatur«?

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Samgongan hevur seinastu árini ikki fylgt fólkaviljanum. Hóast tos um breiða semju og fólkaatkvøðu, so er ongin breið semja gjørd og lýsta fólkaatkvøðan varð avlýst. Mangir føroyingar spyrja av røttum, um vit nú liva í einum diktaturi.

**Samgongan lovaði eina fólkaatkvøðu:**
Eftir at fullveldisætlanin var sjósett, skuldi alt kannast neyvt - var sagt. Tað hendi ikki. Alt skuldi vera soooooo demokratiskt. Statsrætturin skuldi broytast til fólkarætt. Fólkaatkvøða skuldi tryggja eina demokratiska tilgongd eftir serføroyskum leisti. Fólkaatkvøðan skuldi vera: 26 mei 2001

**26. mei 2001: Frá Fólkaræði til einaræði:**
Dagurin, har føroyingar skuldu á fólkaatkvøðu um loysingina nærkaðist. 26 mei 2001. Ein sera stór repræsentativ veljarakanning varð framd áðrenn. Hon vísti, at greiður meiriluti av føroyingum vóru ímóti ætlanini. Avleiðingin av hesum gjørdist, at fólkaatkvøðan varð avlýst???.

*Framhald á síðu 9*

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 8*

Margháttligt, at ein kunngjørd fólkaatkvøða varð avlýst orsaka av eini veljarakanning, ið gekk landsstýrinum ímóti. Um veljarakanningin harafturímóti hevði víst, at andstøðan tapti, so hevði Fólkaatkvøða uttan iva verið hildin. Talan er um eina óhugnaliga einaræðisliga tilgongd, har leiðarin ikki lurtar eftir fólkinum. Men fólkið skal lýða leiðaran.

Ein hugsar, hvat hevði hent í t.d. Danmark um Nyrup Rasmussen avlýsti eina kunngjørda fólkaatkvøðu um t.d. Evruna, tí meiningarkanningar vóru ímóti. Neyvan hevði hann yvirliva ein einasta dag í donskum politikki eftir hetta.

Men í Føroyum tykist slík margháttlig ódemokratisk tilgongd fara fram nærum óátalað. Og uttan at ein einasti spurningur verður settur um hesi viðurskiftir av t.d. 4. statsmaktini.

Eftir sita mangir føroyingar við einum sera viðkomandi spurningi: Eru Føroyar, av Anfinni Kallsbergi, gjørdar til eitt Einaræði.

Ein veljarakanning er aftur kunngjørd sama dag, sum 18 løgtingfólk samtyktu eina yvirtøkulóg við 2. viðgerð.

Hendan veljarakanning sýnir aftur púra greitt, at ein stórur meiriluti av føroyingum IKKI tekur undir við Yvirtøkulóg Landstýrisins.

Føroyingar ynskja harafturímóti eina skilagóða loysn innan karmarnar av Ríkisfelagsskapinum. Eina loysn, har vælferð føroyinga ikki fer fyri bakka. Eini slíkari loysn taka ein stórur partur av Fólkafloks og Sjálvstýrisfloksveljarum undir við. Ja eisini ein stórur partur av Tjóðveldisflokkinum tekur undir við hesi ætlan. Tað er her, tann breiða semjan ímillum føroyingar er.

**Einaræði heldur fram við panikyvirtøkum:**
Men hvat ger løgmaður, eftir at hava konstaterað, at føroyingar ynskja bæði Fullveldisætlanina eins og seinastu panikk yvirtøkuætlanina fyri umleið 500 milliónir krónur, har pipari grør?

Niðurstøða løgmans er, at føroyingar ikki vita hvat teir svara uppá. Við øðrum orðum, so skilir meirilutin av føroyingum lítið og onki. Ímeðan minnilutin, sum løgmaður umboðar, skilir støðuna.

Aftur her sýnir løgmaður einaræðisligan hugburð. Hann blæsir nevniliga á hvat føroyingar siga og halda. Hann ræður. Hann skal ikki fremja fólksins vilja, men sín egna vilja. Tað er sanniliga vandi á fer í Føroyum við slíkum hugburði og framferð hjá løgmanni. Tí eigur løgmaður ikki at fremja fólksins vilja?. Og um hann ikki veit hvat hesin vilji er, so kann ein fólkaatkvøða vísa leiðina. Tað kunnu veljarakanningar eisini gera. Men at nýta eina veljarakanning fyri og aðra eftir til at ganga ímóti fólksins vilja kann als ikki góðtakast yvirhøvur.

**Føroyar og Fólkaflokkurin hava ein leiðslu trupulleika:**
Í ríkisrættarliga spurninginum hava vit sæð mangt, ið onki hevur við demokrati at gera. Tvørturímóti.

Tá fólkaatkvøður verða avlýstar, tí úrslitið ikki hóvar sitandi samgongu, er vandi á ferð.

Tá sáddur verður ivi um førleikan hjá einum meiriluta av føroyingum at svara uppá stillaðar spurningar, bert tí tað heldur ikki hóvar sitandi samgongu, so verður ein diktatorisk tilgongd framd, ið skaðar alt politiskt arbeiði og álit ímillum flokkar framyvir.

**Eru Føroyar eitt lummadiktatur?**
Spurningurin er, um Føroyar undir leiðslu av Annfinni Kallsberg og/ella Høgna Hoydal eru vorðnar ódemokratiskar. Avlýsingin av Fólkaatkvøðuni eins og seinasta veljarakanning sýnir, at demokratiið í Føroyum er skúgva til viks. Teir lurta nevniliga ikki eftir fólkaviljanum. Fólkaviljanum, ið als ikki tekur undir við teirra ætlan.

Sjálvur skilji eg sera væl, at ein meiriluti av føroyingum ikki tekur undir við loysingarætlanini. Hon er nevniliga ein sera stórur skaði fyri Føroyar og íbúgvar tess.

Ein loysn innan Ríkisfelagsskapin eftir t.d. Nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins er ein gongd leið fyri flestu føroyingar. Har vælferðarsamfelagið ikki fer fyri bakka.

∆

# Muslimar og terror

**Jón Gaasedal**



Í Sosialinum týsdagin hevur Malan Johannesen viðmerking til grein ið er samrøða við Jenis av Rana. Tað sum fyrst og fremst ikki hóvaði henni var yvirskriftin “Vit skulu vara okkum fyri muslimum”. Malan sigur í viðmerking síni, at vit skulu minnast til, at tað eru ikki muslimar ið eru orsøk til yvirgangin í m.a. New York og Washington men hinvegin terroristar.

Fyrst og fremst vil eg siga, at eg skilji Maluna væl. Tað skínur ígjøgnum, at henni dámar frið og demokrati, og hon ynskir ikki, at Afghanistan verður útruddað við øllum sínum óseku milliónatals fólki. Eg vænti at soleiðis hugsa flestu rættsiktaðu fólk. Samstundis eri eg samdur við Jenisi um vandan við muslimsku trúnni.

Eg kenni einfalt ein sterkan hug til at koma við eini viðmerking. Eftir at hava fylgt við í fjølmiðlunum seinastu árini, og sæð hvussu lítið polittikarar og tíðindafólk skilja av tí, sum fer fram, tvs. hvat ið aftan fyri liggur, ynski eg at nema leystliga við okkurt av tí sum borið er fram.

Tá Jenis her talar um vandamiklar muslimar, tá veit eg at hann meinar við muslimsku trúnna, og fyrst og fremst um Koranina. Tað framgongur eisini týðuliga í tí sum skrivað varð, at talan er um trúnna — ikki menniskjuni. Hettar vil eg gera eina lítla viðmerking um, vegna tey, ið ikki hava sum dagliga áhugamál sítt at granska ella lesa um slíkt sum átrúna og kristindóm.

Fyri at leggja hart fyri, so er ein fittur og friðarligur muslimur ein óektaður ella falskur muslimur, meðan ein ektaður muslimur fult og heilt er terroristur. Ein kann ikki vera sannur muslimur og ikki samstundis vera terroristur. Hettar er eitt vandamál, ið bert er kent av fáum.

**Snild strategi**
Við kristindóminum síggja vit eisini, at ymist er hvussu neyvt farið verður fram eftir læruni. Summi ganga høgt upp í hettar, meðan onnur bert eru kristin sum eitt eiti. Bíblian hevur ávísar grundleggjandi fyriskipanir. Ein ið baktalar onnur, er ikki ein sannur kristin. Ein ið ikki elskar onnur,- fíggindar sínar íroknaðar, er heldur ikki ein sannur kristin. Ein sannur kristin biður fyri fíggindum sínum, eisini um teir lata bumbur regna um oyruni á viðkomandi ella senda flogfør inn í skrivstovur teirra.

Á sama hátt hevur Koranin greiðar fyriskipanir um hvat ein sannur muslimur eigur at gera. Sum tað mest átroðkandi sigur Koranin, at Ísrael ikki hevur rætt til at vera til. Ísrael skal útslettast av jarðarinnar yvirflátu, tey skulu øll myrðast, og rekast út í havið móti vestri. Tann ið hettar ger, er, eftir Koranini, er ein góður muslimur. Ein muslimur hevur ikki loyvi til at binda frið við Ísrael. Koranin sigur, at eru trupuleikar ið gera at ikki ber til, her og nú, at útrudda Ísrael, so kunnu teir gera eina 10 ára vápnahvílu — men ikki friðarsáttmála. Eftir hesi 10 árini skal kríggj verða. Er tað heilt ómøguligt at vinna hettar heilaga kríggið, so er loyvt enn einaferð at seta í verk eina 10 ára vápnahvílu. Eftir hesa seinnu vápnahvíluna SKAL TAÐ VERA KRÍGGJ, óansæð um allir muslimar lata lív. Teir koma so beinleiðis í paradís.

Muslimar hava eisini eina aðra sera snilda og vandamikla strategi sum ikki nýggj, men hevur verið nýtt fyrr í søguni: Um ein ikki kann sigra á fíggindanum, so infiltrera hann! Muslimar eru í túsundatali integreraði í demokratisk samfeløg. Hvør familja eigur at fáa 10 ella helst 20 børn. Í einum landi sum t.d. Danmark, har hvørt danska parið fær millum eitt og tvey børn, er skilligt hvat hettar kann enda við eftir stutta tíð. Landið verður heilt einfalt eitt muslimskt land eftir stuttari tíð. Við verðandi støðu er Danmark eitt muslimskt land um 15-20 ár. Tá hava teir politiska ræðið í landinum. Í Danmark fæst munandi stuðul til hvørt barnið, og eitt par við 10 børnum kann liva feitt av hesum, og hevur ikki aðra inntøku fyri neyðini. So ein kann væl siga, at danir fíggja sjálvir sín egna undirgang.

**Hata amerikumenn**
Í skrivandi stund hevur verið uml. 20 ára vápnahvíld við ísrael. Tey ið framvegis tala um friðartingingar hava fullkomiliga misskilt okkurt. Yassur Arafat hevur ikki tikið hattar orðið “friðartingingar” upp á tunguna, hann tosar bara um vápnahvíld — sum góður muslimur. Arafat hevur eisini aðrar - ikki duldar førleikar. Hann dugir at lippa og fáa varrarnar at skelva meðan hann stamar sína samkenslu til sínar argastu fíggindar og til tíðindafólk. Tíðindafólk á sjónvarpsrásini BBC World vóru týðiliga imponeraði av hesi ólekru framførðslu. Eisini lat hann blóð til tey vanlukkuraktu. Vónandi varð hettar blóðið stoytt burtur, tí tað er ríkiligt av illum blóði í USA. Vit eru tíbetur nøkur ið ikki falla fyri slíkum hykli.

Muslimar hata fyrst og fremst amerikumenn, tí teir halda hondina yvir Ísrael. Hattar álopið á USA er fyrst og fremst eitt úrslit av hesi 20 ára vápnahvíld við landið Ísrael; hettar land, sum til einhvørja tíð — einsamalt — kann útrudda allan muslimska heimin við sínum kjarnorkuútbúnaði. Tað er taktiskt nógv skilabetri at leypa á USA enn beinleiðis á Ísrael,- av fleiri orsøkum.

Í einum heilagum kríggið, har allir muslimar fara beinleiði til paradísið, er um at gera at drepa so mangar “vantrúgvandi hundar” sum møguligt, íroknað Jenis, Maluna og Jón. Um kríggið bara verður millum muslimska heimin og Ísrael, so halda øll onnur seg uttanfyri, burtursæð frá vinnuligari vápna- og medisinsølu, ið altíð er kærkomin inntøka, og annars tað ið hevur við oljuáhugamálini at gera. Muslimar í t.d. Danmark høvdu tá búð í einum uttanveltaðum landið, og kundu tí einans fylgt við í sjónvarpi og sæð hvussu fólk teirra varð slaktað. Nei, munandi skilabetri er at fáa allan heimin uppí. Gerst eitt sameint álop á Afghanistan nóg ljótt,- ella kanska fyrr, og andligu leiðararnir rópa “Heilagt kríggj” til muslimsku íbúgvarnar í vesturheiminum, ja so er tað bara hugflogið ið setur mørk fyri hvat tað hevur við sær í hesum londum ið beinleiðis eru í parti við fíggindar teirra.

**Óloysiligt**
Ein sannur muslimur hatar ikki bara USA og Ísrael. Ein sannur muslimur hatar TEG! Hann ynskir at DREPA TEG! Hettar krevur Koranin, og lovar gull og grønar skógir afturfyri. Hvussu leingi ætla vit at vera góðtrúgvin? Hvussu leingi ætla vit at rokna menniskjuna sum góða?

Trupuleikin er óloysiligur. Koranin sigur at muslimar skulu drepa. Bíblian sigur at vit skulu biða fyri teimum meðan teir drepa okkum. Tað er bert ein háttur at steðga júst hasum trupuleikanum, og tað tilkemur als ikki einum kristnum at gera tað: At tveita eina ella fleiri kjarnorkubumbur yvir lond teirra. Hettar loysir ikki trupuleikan upp á longri sikt, tí fananskapurin býr líka so væl í okkum sum í teimum. Menniskjan er einfalt ónd. Munurin er bara tann, at muslimar hava eina trúgv ið noyðir tey. Eitt annað ið vit kunna gera, er, einfalt, at forða fyri at muslimar slepp inn í landið.

Eitt gott og vælmeint ráð til alt Føroya fólk, ja allan heimin tað sama: Fyrireikið tykkum til at framtíðin ikki verður ein dansur á rósum. Henda atgerð ímóti USA er bert viðfáningur til tað ið kemur — eftir bíbliuni at døma. Søkið Harran Jesus Kristus NÚ!

